Hindugudurin Rama og kona hansara, Sita. Á knæ framman fyri tey, gudurin Hanuman.

Hinduisma

Hinduisma er ein av teimum elstu og størstu heimsátrúnaðunum. Teir eru kristindómur, islam, hinduisma, buddisma, jødadómur, kinverskur og japanskur átrúnaður. Kristindómur, islam og jødadómur eru monoteistiskir, t.v.s. trúgva á ein Gud. Hinduisma hevur fleiri gudar. Tey, ið hava hinduismu sum átrúnað, verða nevnd hinduar.

Hinduisma er ein ógvuliga fjølbroyttur átrúnaður, sum mentist í Indusdalinum. Hinduisma merkir *átrúnaðurin hjá indarum*, og tað vóru evropearar, sum fyrstu ferð nýttu heitið í 1800-talinum. Í India verður sagt, at tað eru eins nógvar smáar hinduistiskar siðvenjur, sum tað eru bygdaløg, og tey eru fleiri enn 3 milliónir í tali.

Tað ber ikki til at siga, at ein einstakur persónur grundaði hinduismuna. Heldur er tað so, at hinduisman er ment yvir eitt ógvuliga langt tíðarskeið. Helst fleiri túsund ár.

Hinduisman hevur ongar profetar og onga trúarjáttan, og størri dentur verður lagdur á lívsførslu enn á hugsanarhátt.

FAKTA

"Aum" er ímyndin av Brahma, Vishnu og Shiva. Aum verður eisini mett at vera heilagsta ljóðið, ið øll onnur ljóð stava frá.

Visti tú

at indarar sjálvir ikki nýta orðið hinduisma, men heldur Sanatan-dharma, sum merkir "tann æviga heimsskipanin".

? bygdaløg · grundaði

Søgan hjá hinduismuni

Søgan hjá hinduismuni er nær tengd at søgu India. Útgrevstur í Indusdalinum ber boð um eitt ógvuliga framkomið og væl skipað samfelag, ið var har á leiðini um ár 3000 til 1700 f.Kr. Eisini funnu fornfrøðingar standmyndir, sum bóru boð um, at fólk trúðu á eina móðurgudinnu og ein tarv. Stórt baðiøki ber boð um, at reinsan hevur verið ógvuliga týdningarmikil.

Um ár 1500 f.Kr. kom eitt fólkaslag, sum nevndist *ariar*, og tók valdið í landinum. Við teimum kom onnur mentan og siðvenja, sum so ávirkaði trúgv og hugburð hjá teimum, ið búðu har frammanundan. Hesir ariar trúðu á náttúrugudar, sól, mána og stjørnur, eins og víkingar, sum eisini vóru av ariskari ætt.

Fólkið á indisku hálvoynni varð við tíðini blandað við onnur fólkasløg, sum komu hagar úr øðrum londum eitt nú londunum við Kaspiskahavið. Hvørt fólkaslag má metast at hava sett síni spor, eisini átrúnaðarliga. Eitt nú vita vit um islamska ávirkan um ár 1100 e.Kr.

FAKTA

Heimsátrúnað nevna vit ein átrúnað, sum hevur nógv viðhaldsfólk, og sum er spjaddur um stóran part av heiminum.

Segl við innskrift og myndum.

Ein lítil bygd í landspartinum Ladakh, við ánna Indus í Indusdalinum.

? framkomið · hugburð

Rigvedahandrit frá 19. øld.

Heilagu skriftirnar

Um ár 1200 f.Kr fóru hesir ariar at gera lovsangir, vedasangir til heiðurs fyri gudarnar. Við tíðini eru teir vorðnir heilagu tekstirnir hjá hinduum. Tað er ein ørgrynna av heilagum tekstum í hinduismuni, men hildið verður, at vedatekstirnir eru teir, ið hava størsta myndugleikan.

Tekstirnir hava livað á mannamunni eins og kvæðini. Teir vóru fyrst *shruti*, sum merkir hoyrdir, og síðan *smriti*, sum merkir lærdir uttanat. Shrutitekstirnir verða hildnir at vera opinberingar, og smrititekstirnir eru vorðnir til eftir vedatíðina og eru skaptir av menniskjum. Um ár 1200 f.Kr skrivaðu prestarnir tekstirnar niður.

Vedasangirnir eru skrivaðir á gomlum ariskum máli, sanskrit, sum føroyskt eisini er sprottið av. Tað málið tosar eingin nú á døgum, men prestarnir skilja tað.

Vedasangirnir eru fýra í tali, og hinduar meta teir at bera boð frá einum hægri mátti um, hvussu vit skulu skilja lívsins stóru spurningar.

Vedasangirnir eru

1 Rigveda

Rigveda, ið svarar til eina sálmabók, hevur fleiri enn túsund sálmar til 33 gudar og greiðir frá ritualum í sambandi við at dyrka hesar gudar við ofringum. Hetta eru náttúrugudarnir, sum stýra náttúrukreftunum. Hinar vedurnar greina, hvussu ritualini skulu vera. Sálmarnir hava ørindi við tveimum ella fýra reglum, og verða hesi ørindi nevnd *mantra*.

FAKTA

Orðið "veda" merkir heilag vitan ella opinbering.

2 Samaveda

Samaveda, ið svarar til eina nótabók, hevur løg til sálmarnar í Rigveda, so til ber at syngja teir, tá ofrað verður.

3 Yajurveda

Yajurveda, ið svarar til eina ritualbók, hevur ørindi, sum presturin, ið leiðir ofringina, sigur.

4 Atharvaveda

Atharvaveda, ið svarar til eina rúnabók, er um andar, mystikk og gand.

Til *shruti* hoyra tekstir, sum eru av meira hugvísindaligum slagi.

- *Brahmana tekstir*, sum eru um offurritual
- *Aranyaka tekstir*, sum m.a. greiða frá tí at liva í einsemi
- *Upanishadu tekstir*, ið eru bygdir upp sum ein samrøða millum lærara og næming um týdningarmikil evni eitt nú menniskjasálina *atman*, tað guddómliga í menniskjanum, og heimssálina *brahman*, sum er tað guddómliga í øllum livandi, fólki, djórum og plantum

Smriti eru heilagir tekstir, skrivaðir við íblástri frá guddómligu tekstunum. Tekstirnir eru lættari hjá fólki at ogna sær og skilja. Hesir heilagu tekstir hava livað á mannamunni, og enn eru fólk, sum duga teir uttanat. Í hesum tekstum verður guddómurin meira persónligur, og hildið verður, at hann er í menniskjunum við tað, at hann hevur skapt tey, hann elskar tey, hann fær tey at vera áhugað í átrúnaði, og at enda fríar hann tey úr endurføðingarringrásini. Hetta nevna vit eisini reinkarnatión. Ørindini úr hesum tekstum verða ofta søgd í dagligu bønini. Teir gomlu tekstirnir vóru ikki altíð lættir at skilja. Tí vórðu søgur ella yrkingar sagdar við boðskapi úr gomlu tekstunum.

FAKTA

Endurføðingarringrás ella reinkarnatión merkir, at tá eitt menniskja doyr, fer sálin úr likaminum og verður fødd í einum nýggjum likami.

Ein kend yrking er Mahabbharta. Hon er við sínum 100.000 ørindum longsta yrking í verðini, verður sagt.

Í hesi yrking er flættað inn í søguna alt tað, sum ein hindu skal gera og halda seg til. Evnini eru mong og fjølbroytt, t.d. søga, stjórnarskipan, lóg og rættur, siðalæra, ritual og læran um alheimin. Sagt verður eisini frá um menniskju og gudar og um, hvussu undur og óndar maktir ávirka eitt vanligt menniskjalív.

Ein partur av yrkingini, Bhagavad-gita, er skrivaður millum ár 400 f.Kr. og ár 400 e.Kr. Bhagavad-gita merkir "sangur Harrans" og er millum best umtóktu skriftir í hinduismuni.

Gudurin Krishna.

Kríggj var brostið á millum pandavaarnar og kauravaarnar, sum vóru ættaðir frá tveimum kongssynum, tí báðar ættir vildu hava trónuna. Ein av pandavabrøðrunum, Arjuna, legði til merkis, at fleiri í mótstøðuliðinum vóru í ætt við seg og noktaði at kríggjast móti síni egnu familju, so hann legði vápnini. Hann bað vognførara sín, sum vísti seg at vera gudurin Krishna, um ráð. Krishna gav Arjuna tey ráð, at Arjuna hevði skyldu at halda fram í stríðnum og segði, at um tú drepur likamið, so ber ikki til at drepa sálina, hon er ódeyðilig og heldur fram í øðrum kroppi. Arjuna skuldi ikki hugsa so nógv um fylgjurnar av sínum gerðum, men heldur hava álit á, at gud heldur skil á øllum og fær rættlag í, har ruðuleiki valdar.

Hinduistisk biðitrumla.

Læran

Hinduisma er merkt av tolsemi og fjølbroytni, t.v.s. at bólkar kunnu hava sínar gudar og síni ritual og verða vird fyri tað. Hóast nógvir ymiskir hinduistiskir bólkar og ritual finnast, so hava flestu bólkar nakað í felag.

Dharma

sum er læran um alheimsskipanina um lógir og um skyldur.

Samsara

sum er læran um ævigu ringrásina. Tá eitt menniskja doyr, livir sálin, atman, víðari í einum øðrum skapningi.

Karma

sum er læran um, at alt hevur eina orsøk og ein virknað, sum fær avleiðingar bæði í hesum lívi og einum komandi lívi.

Moksha

sum er læran um, at tað er gjørligt at verða loystur frá endurføðingarringrásini. Tað hendir bara, tá sálin hevur loyst seg frá øllum bindingum.

Kastuskipanin

sum er umleið 3000 ára gomul, har fólk eru býtt sundur í bólkar ella kastur, har øll ikki eru eins fyri. Tað kann sammetast við stættir í okkara parti av heiminum.

Málið hjá einum hindu er at bróta ævigu ringrásina, so hann ikki verður endurføddur, men fríaður og sameindur við Brahman, heimssálina. Hinduisma tosar mest um tríggjar vegir.

Atferðavegurin *karma-marga*

sum er vegurin í kastuskipanini. Tað ræður um at gera og halda alt tað, sum er galdandi í tí kastu, tú hoyrir til, og at gera minst eina góða gerð hvønn dag. Tað er týdningarmikið at liva rætt, hjálpa neyðstøddum uttan at vænta nakað afturfyri, ikki lúgva, stjala ella gera teg inn á nakran.

Kunnleikavegurin *jnana-marga*

leiðir við yoga og meditatión til málið, sum er at fáa fullkomið tamarhald á sær sjálvum. Tað eru skúlar í India, har undirvíst verður í hesum. Hesin vegur er langur og torførur. Kvinnur kunnu ikki verða fríaðar á henda hátt.

Kærleiksvegurin *bhakti-marga*

gevur fólki úr lægri kastum, eisini konufólki, møguleika at verða fríað. Ein hindu, sum fylgir hesum vegi og roynir at finna tað guddómliga í øllum, fær frían frá endurføðingarringrásini afturfyri serliga frá Krishna, sum er ein avatarur av Vishnu.

FAKTA

Mandala eru samskapaðar myndir. Tað kunnu vera rundingar ella onnur skap, ofta gjørd sum blomstur, krossar ella hjól.

Mandala er at finna í nógvum mentanum og átrúnaðum, eitt nú hinduismuni.

Nógv børn kenna skapini frá mandala málibókum.

Ein avatarur er ein gudur, sum kemur til jarðar í menniskja- ella djóralíki.

Visti tú

at hinduisma viðurkennir Jesus, sum eina endurføðing av brahman, heimssálini.

Guddómar

Hinduar hava nógvar gudar. Men tað eru eisini hinduar, sum halda, at allir gudarnir í veruleikanum eru ein og sami gud, vit duga bara ikki at síggja tað. Tað kann sammetast við, at um fleiri fólk við bindi fyri eyguni stóðu rundan um ein fíl, og vóru biðin um at siga, hvussu hetta djórið sá út, so hevði tann, ið helt í trantinum, ikki somu uppliving av fílinum, sum tann, ið helt í eitt afturbein.

Guddómarnir Brahma, Vishnu og Shiva eru høvuðsgudarnir.

Brahma er skapanargudur og verður oftast nevndur í sambandi við skapanarsøgur. Tó hevur hann ongan týðandi leiklut í gudadyrkanini, og fá tempul eru bygd honum til heiðurs.

Vishnu verður hildin at vera tann, sum heldur øllum tí skapta í gongd. Av og á í søguni má hann koma til jarðar sum avatarur, til tess at frelsa heimin. Vishnu hevur tíggju avatarar: fiskur, skjaldbøka, villsvín, maður-leyva, dvørgur, Rama við øksini, Rama, Krishna, Budda og Kalkin. Teir fyrstu nýggju avatarnir hava verið, tann tíggjundi, Kalkin, fer sambært hinduismuni at koma ríðandi á einum hvítum hesti at frelsa heimin, so ein nýggjur kann byrja.

Shiva er bæði guddómur fyri oyðilegging og fruktbari. Hann syrgir bæði fyri lívgevandi regni og oyðandi flóð. Hann verður ofta avmyndaður dansandi í einum hjóli, har hann dansar heimin í sor til tess at fáa ein nýggjan heim.

Shiva hevur ongar avatarar. Hann verður ofta settur í samband við fráhald og yoga.

Shiva eigur tveir synir, fílagudin Ganesha, sum skapar eydnu og krígsgudin Skanda. Shiva er eisini gudur fyri fruktbari, og tí verður hann ofta settur í samband við erotikk og avmyndaður erotiskt.

Kastur

Kastuskipanin er nevnd í Rigveda. Tað hendi, tá frummenniskjað Purusha varð ofrað. Tann mýtan sigur, at úr munninum kom prestastættin, úr ørmunum komu krígsstættin og yvirvaldsstættin, keypmenn og bøndur komu úr lørunum, og tænastufólk komu úr fótunum.

Tessvegna var kastuskipanin soleiðis flokkað eftir tign

1. Prestar
2. Krígsmenn og embætisfólk
3. Handilsfólk og bøndur
4. Tænastufólk ella fólk, sum tæna teim hægru kastunum

Uttan fyri hesar fýra kastur var ein onnur, tey kastuleysu. Tað vóru tey, sum høvdu eitt arbeiði, sum var enn lægri enn tað at tæna øðrum. Tað kundi eitt nú vera at virka sum bøðil, at gera lík í stand, jarða lík, garva skinn og fáast við fiskiskap.

Hetta var tann elligamla kastuskipanin. Sum tíðin leið, og ymisk nýggj yrki tóku seg upp, komu fleiri undirbólkar til kasturnar, men allastaðni var tað galdandi, at prestar vóru hægstir, og tey kastuleysu vóru lægst. Undirbólkarnir vórðu nevndir jati. Hjá jati-bólkunum var tað galdandi, at tú vart føddur í ein ávísan jati-bólk, tú gifti teg við einum úr tínum bólki, tú fekst tær eitt arbeiði samsvarandi bólkinum, og øll í bólkinum høvdu somu ritual.

Í 1947 gjørdist India sjálvstøðugt. Bretar høvdu tá havt valdið síðan 1858. Í 1947 varð kastuskipanin eisini alment avtikin. Síðan tá er so nógv broytt. Fólk ferðast meira, tey flyta burtur, og fleiri nýggjar vinnur hava tikið seg upp. Nú kann tað meira enn so henda, at ein úr tænastukastuni forvinnur meira pening enn ein úr prestakastuni. Mong vita ikki heilt hvørja upprunakastu, tey hoyra til, hóast tey vita hvønn jati-bólk, tey hoyra til.

Tað er tó ikki sum at siga tað at taka eina so gamla skipan av. Í indisku grundlógini stendur, at eingin skal vera fyri mannamuni, sama hvørja kastu tey hoyra til. Ein lóg, sum kom seinni, sigur, at nøkur pláss hjá tí almenna, á lærdum háskúlum og í tinginum altíð skulu verða givin fólki úr teim lágu kastunum. Hetta er gjørt, fyri at fólk skulu vera meira javnsett. Serliga í fjarskotnu pørtunum í India stendur kastuskipanin enn sterk.



FAKTA

Kastuskipanin hevur eisini nakað við reinleika at gera. Alt, sum kemur av likaminum ella kemur inn í likamið, er óreint. Matur og drekka er heldur ikki reint í sær sjálvum, tí hevur tað týdning, hvørjum tú etur ella drekkur saman við.

? frummenniskjað · bøðil · garva · yrki

Elloratempulholurnar í India eru 34 í tali. Hetta er tann 16. tempulholan, Kailasa.

Ein gomul indisk kona vaskar sær um føturnar.

Tempul

Halgidómur hjá hinduum er templið. Tey eru í túsundatali um alt India. Ofta verða templini bygd, har okkurt týdningarmikið og guddómligt er hent. Vatn má vera á staðnum, tí at reinsan hevur nógv at siga í hinduismuni.

Templini kunnu vera stór og prýðilig, men kunnu eisini vera smá hús fram við vegjaðaranum. Tey stóru templini eru ofta skapað sum eitt fjall, eitt nú sum Kailasafjallið í Himaleia, bústaðurin hjá gudinum Shiva. Templini eru ikki bygd til stórar felags gudstænastur, men heldur til at fólk vitja halgidómin eftir tørvi. Við serlig høvi verða samkomur tó hildnar uttanfyri á tempulplássinum. Ein hinduistisk gudtænasta, puja, kann verða hildin av einum ella fleiri saman. Tá ein hindu vitjar templið, letur hann seg úr skónum uttan fyri halgidómin og vaskar sær um føturnar.

Ein trúgvandi kann koma í templið fyri at biðja um eina serliga tænastu, at uppfylla eitt heilagt lyfti ella fyri at taka lut í prasada, guds náði. Tá ber hann gudinum eitt matoffur, sum presturin býtir út aftur til tey vitjandi. Bert presturin kann fara inn í tað innasta rúmið, tað allarheilagasta, har gudurin býr. Uttanfyri bukkar tann vitjandi fyri at

Hindumunkur slær á trummu í einum templi.

vísa gudinum virðing. Hann steðgar átta ferðir, eina ferð fyri hvørja høvuðsætt, suður, norður, eystur og vestur, og eina ferð fyri tær ættir, ið eru millum høvuðsættirnar. Síðan nemur tann vitjandi við veggin antin við hondunum ella við pannuni.

Hinduar hava eisini halgidómar í heimunum. Ofta eru tað gudamyndir, oljulampa og heilagar skriftir, sum standa eitt sindur til viks í heiminum ella í einum rúmi fyri seg. Eisini her vísa tey virðing við at lata seg úr um føturnar. Her biðja tey morgun og kvøld.

Litpulvur.

Pílagrímsferðir

Hinduar hava eina ørgrynnu av heilagum støðum. Næstan hvør á og hvørt fjall hevur sín átrúnaðarliga týdning. Við at vitja hesi støð við virðing, halda hinduar, at teir eru nærri viðkomandi gudi ella halgimenni, og at teir verða vælsignaðir við yvirnátúrligari megi. Tey flestu koma tó bara fyri at uppliva náði og kærleika, darshana, tá tey skoða gudamyndina, og myndin skoðar tey. Tað er líka mikið, hvussu tú kemur til hesi støð, til gongu, á súkklu, við bil o.s.fr.

FAKTA

Nøkur heilag støð eru áin Ganges, og býirnir Varanasi og Allahabad.

Høgtíðir

Tað eru rættiliga nógvar høgtíðir í hinduismuni, og allar verða ikki hildnar allastaðni. Tað er munur á Norðurindia og Suðurindia, og somu høgtíðir verða ikki hildnar í senn ella á sama hátt. Nú á døgum eru høgtíðir, sum upprunaliga vóru tengdar at landbúnaðinum, vorðnar átrúnaðarligar høgtíðir. Nýggjárið verður ikki hildið samstundis har norðuri og har suðuri í India. Summi halda nýggjár um várið onnur um heystið.

Verðsliga lívið í India fylgir tí gregorianska álmanakkanum, og átrúnaðarligi álmanakkin við sínum høgtíðum er roknaður út eftir stjørnufrøðini. Stjørnuspáfólk rokna út, nær besta tíð er til offur, føstu o.a.

Kendar høgtíðir eru navaratra, divali, holi og føðingardagarnir hjá Rama og Krishna.

Navaratra

Navaratra, tær tíggju næturnar, er til minnis um, at móðurgudinnan, Durga, vann á búfflademoninum, Mathisa. Mýtan sigur, at Mathisa hevði tikið valdið á himni og á jørð. Hann helt, at hann kundi tíggja sær, sum hann vildi, tí Brahman, skaparin, hevði lovað honum, at bara ein kvinna kundi gera av við hann, og tað helt Mathisa ikki vera serliga sannlíkt. Í hesi mýtu verður Durga skapað av glæmuni frá mannligu gudunum. Teir høvdu sjálvir ikki megi at vinna á Mathisa. Durga fær eitt vápn frá hvørjum gudi, og tá Mathisa skapar seg um til ein búffil og loypur á Durga, verður hon ikki særd. Mathisa skapar seg um aftur til ein demon, men tá rennur Durga eitt svørð í hann, so hann doyr. Tað góða vann á tí ónda. Hesar tíggju næturnar brennur eitt ljós á altarinum heima, fólk halda gudstænastu hvørja nátt, tey ofra, halda veitslu og dansa.

Veitsla og dansur í sambandi við navaratra.

? mýtan · tíggja sær · sannlíkt · demon

Divali

Divali, ljósveitslan, verður hildin tjúgu dagar eftir navaratra. Hon verður hildin til minnis um eydnugudinnuna Lakshmi, mann hennara, gudin Vishnu, og deyðaandan, Yama. Høgtíðin er til minnis um, at ljósið vinnur á myrkrinum, at eydnan vinnur á óeydnuni, og at tað góða vinnur á tí ónda. Veitslan varir í fýra dagar, sum eru ymiskir.

Divali er eisini nýggjárið har norðuri í India. Tað verður hildið við at vaska sær í vælangandi olju, fara í nýggj klæði, geva gávur og eta góðan mat.

Børn hava tendrað ljós í sambandi við divali.

Holi

Holi, várveitslan, verður hildin í februar ella mars mánaði. Hon verður altíð hildin, tá fullmáni er, og er til minnis um, at nú má myrkrið víkja fyri ljósinum. Hon kann vara frá einum degi til fýra dagar, fólk eru í góðum lag og leggja allan kastumun til viks hesar dagar. Høgtíðin hevur eisini samband við mýtuna um demonkvinnuna Holika, sum ætlaði at brenna skyldmannin Prahlad á báli, av tí at hann hevði tilbiðið gudin Vishnu. Vishnu bjargaði Prahlad, og Holika var brend á bálinum í staðin. Hesa høgtíð brenna hinduar eina dukku á báli, sum skal minna um Holika. Eisini kasta tey litríkt pulvur á hvønn annan, og fólk spæla hvørjum øðrum okkurt puss.



Gomul kona hátíðarheldur holi.

? skyldmannin · puss

Í India gongur kúgvin sum hon vil allastaðni.

Visti tú

at vit eiga máliskuna, at okkurt er ein heilag kúgv. Tað merkir, at hetta má ikki nertast.

Heilagar kýr

Hinduar hava virðing fyri øllum livandi, eisini djórum. Eitt djór er serliga heilagt, og tað er kúgvin. Vedaskriftirnar siga, at frá kúnni er alt lív komið, og virðing fyri kúnni er tað sama sum virðing fyri lívinum. Hinduar nýta kúnna at draga við, mjólkin kann drekkast, og mykjan kann brúkast til tøð, turkast til at byggja við og sum brenni. Hinduar eta ikki neyta- ella oksakjøt.

Yoga

Orðið religión kemur av latínska orðinum religare, sum merkir "aftur at knýta seg fast við". Týdningurin her er, at menniskjað hevur mist sambandið við guddómin og tørvar eitt amboð at knýta sambandið aftur. Yoga er ein hinduistiskur lívsstílur, har tað ræður um at hugsavna seg ella at fáa samband aftur við guddómin. Tað kunnu vit fáa við at hava tamarhald á likami og andadrátti og sita so still, at alt órógvandi verður stongt úti. Vit fara á onkran hátt í eina verð, har allir sansir hvíla. Á okkara leiðum verður yoga ofta javnsett við fimleik.

Standmynd av Mahatma Gandhi.

Gandhi

Mohanda Karamchand Gandhi varð føddur í India í 1869. Har gjørdist hann kendur sum Mahatma Gandhi. Mahatma merkir "stóri andi". Gandhi lærdi til sakførara í London og arbeiddi eitt skifti í Suðurafrika.

Tá indarar fyrst i 1900-talinum fóru at seta seg upp ímóti bretska yvirvaldinum, fór Gandhi heim til India at hjálpa til at loysa frá bretsku trónuni. Tað var umráðandi hjá Gandhi ikki at nýta vald, men heldur gera friðarliga mótstøðu. Sjálvur varð hann tó tikin til fanga fleiri ferðir, eins og hann svøltaði seg fyri at gera vart við síni sjónarmið, seinastu ferð í 1948 fyri at forða fyri, at India varð býtt sundur í eitt muslimskt og eitt hinduistiskt øki.

Í 1947 fekk India sjálvræði. Landið varð tó býtt sundur í eitt muslimskt øki, Pakistan, og eitt hinduistiskt øki, India. Stutt eftir varð Gandhi myrdur av einum víðgongdum hindua, sum helt, at Gandhi hevði svikið hinduar og hinduismuna.

Indira Gandhi, sum í 1966 varð vald til forsætisráharra í India, varð myrd í 1984 av einum lívverja. Sonur hennara Rajiv Gandhi tók við eftir móður sína, men varð myrdur í einum valstríði í 1991. Heilt so friðarligt, sum Mahatma Gandhi ætlaði, gjørdist fyrsta tíðarskeiðið hjá einum frælsum India ikki.

Russiskt frímerki við mynd av Indiru Gandhi.

Lívshátíðir

Føðing

Tá ein hinduistisk kvinna fær eitt barn, er barnið hindu. Hjá hindum er týdningarmikið nágreiniliga at vita, nær barnið er føtt, tí tað er týdningarmikið at vita, tá presturin skal leggja horoskop fyri barnið og greina, hvussu framtíðin verður. Tað sær presturin við at kanna, hvørja støðu stjørnurnar høvdu, júst í tí løtu barnið varð føtt.

Sambært skriftunum í hinduismuni hoyra 16 ymisk samskararitual til eitt mannalív, og tey skulu gerast í ymiskum aldri.

Samskararitual

1.	Garbhadhan	í sambandi við, at eitt par ynskir sær børn
2.	Punsavanam	tá kvinnan er í triðja ella fjórða mánaði
3.	Simantonnayana	millum fimta og áttanda mánað
4.	Jatakarma	tá barnið verður føtt
5.	Namakarana	tá barnið fær navn
6.	Niskramana	í triðja ella fjórða mánaði, tá barnið fer út úr heiminum fyrstu ferð
7.	Annaprashana	tá barn fær fasta føði fyrstu ferð
8.	Chudakarma	tá hárið verður klipt fyrstu ferð, millum fyrsta og triðja árið
9.	Karnavedha	tá barnið fær ringar í oyrað, millum triðja og fimta árið
10.	Upanayana	tá barnið fer í skúla
11.	Samavartana	tá skúlagongdin er liðug
12.	Vivaha Samskara	hjúnabandsritual
13.	Grihasthashrama	tá farið verður at halda hús
14.	Vanprasthashrama	tá tú leggur húsarhaldsarbeiðið frá tær
15.	Sanyasashrama	at liva fráhaldandi og hugsavnandi í ellisárum
16.	Antyeshti	jarðarferðarritual

4. Jatakarma

Fjórða samskararitualið er tá barnið er føtt. Pápin ella ein prestur gevur barninum ein dropa av hunangi ella tílíkt, ofta gjøgnum ein gullring, og sigur: *Gævi títt lív verður eins virðismikið og gull. Tað er bundið at tínum hugsanum, tínari talu og tínum gerðum.*

5. Namakarana

Fimta samskararitualið er, tá barnið fær navn tólv dagar gamalt. Ofta verður prestur biðin um at finna eitt navn í samsvari við stjørnustøðuna, tá barnið varð føtt. Pápin teskar navnið í oyrað á barninum. Síðan kunnger elsta kvinna í familjuni navnið. Vinir og familja halda eina veitslu og eta eitt nú søtmeti gjørt av frukt, nøtum og sukri.

Skiftið til vaksnamannalívið

Hinduisman ger einki serstakt burturúr, tá eitt barn verður vaksið. Tó, tá ein hinduistiskur drongur úr hægru kastunum fer undir útbúgving, verður hann ofta rakaður, vaskaður og latin í fín klæði. Ofrað verður í eldi, og drongurin fær ein heilagan tráð. Henda tráð bera menn um høgru øksl. Hann lærir eitt mantraørindi, sum hann skal siga restina av lívinum.

Hesi ritual eru ikki galdandi fyri gentur. Teirra fremsti leiklutur er at gerast góðar konur og mammur.

Hjúnalag

Í hinduismuni er hjúnalagið ógvuliga týdningarmikið. Tað tryggjar, at ættin og samfelagið kann halda fram. Tey flestu hjúnaløgini eru avtalað frammanundan, ella ið hvussu er hálvavegna, við at hin ungi fær eitt uppskot frá onkrum av teimum eldru, hvønn tey halda vera tann rætta makan. Ein prestur kann hava verið spurdur, ella tey kunnu hava samanborið stjørnustøðuna hjá teimum ungu. Stjørnustøðan hjá teimum ungu er eisini avgerandi fyri, hvønn dag vígslan verður, fyri at tryggjað eydnu og fruktbari í hjúnalagnum. Kastan, málið og traditiónin hevur eisini nakað at siga, tá maki skal veljast. Tá tvey verða trúlovað, koma menn úr báðum familjum saman at lesa úr skriftunum og biðja. Teir eta saman, áðrenn hvør fer til sítt.

Í teimum stóru býunum kemur tað alt oftari fyri, at hetta ikki er mynstrið longur. Tað er kærleikin millum tvey, sum er avgerandi, og tey velja tann brúdleypsdag, tey halda passa best.

Hinduistisk brúðarvígsla.

Í sambandi við upanayanaritualið fær drongurin ofta ein stav, eitt belti og ein heilagan tráð.

FAKTA

Pletturin í pannuni er ein átrúnaðarlig ímynd í hinduismuni. Hjá kvinnum verður hann nevndur bindi. Fyrr í tíðini merkti pletturin, at kvinnan var gift. Fólk hildu eisini, at hann vardi móti óndum eygum. Nú á døgum er hann mest sum bara eitt prýði at líkna við varrastift hjá okkum. Pletturin kann vera málaður á pannuna ella klistraður á sum klisturmerki. Han kann vera rundur ella mynstrutur.

Brúður verður gjørd klár.

Ein vanlig hinuduistisk vígsla kann fara fram í einum templi, í einum veitslusali ella í heiminum hjá brúðrini. Pápi brúðrina gevur brúðgóminum dóttur sína. Hon fær gávur og ognarlutir við heimaníframá. Ofta er brúðurin serliga vakurt smurd um eyguni, og vøkur mynstur eru gjørd við hennaliting um hendur og føtur. Hon er ofta í reyðum og gyltum sari, og hevur nógvar gullsmúkkur. Tað er tiltikið, at tað tekur tíð at pynta brúður, og so er eisini í India. Ímeðan heldur brúðgómurin eitt slag av andakt, har hann ger seg til reiðar til tað nýggja lívið sum giftur.

FAKTA

Mangalsutra er hálsprýði, sum gift kvinna ber sum tekin um kærleika og góðsku.

Ofta ber brúðurin slør fyri andlitið, men viðhvørt er eitt klæði hongt upp millum brúðarparið. Undir vígsluni fer slørið ella klæðið frá. Eitt band er knýtt millum høgru hendurnar, og í tí at pápin letur dóttrina frá sær, verður vígt vatn slett á bandið. Tað verður biðið, og ris verður ofrað.

Viðhvørt gevur brúðgómurin brúðrini eitt hálsband av svørtum perlum, sum hon skal brúka, so leingi sum hann livir. Ein heilagur eldur verður kyndur í einum ílati, og brúðarparið tekur sjey fet, runt um eldin. Fetini eru bøn um føði, styrki, ríkidømi, eydnu, børn, árstíðirnar og eitt langt vinalag. Um kvøldið hyggur brúðarparið upp ímóti stjørnunum, og tey lova hvørt øðrum ævigan trúskap.

Indisk lóg loyvir hjúnaskilnaði, men mong halda enn fast í gamla siðvenju, har hjúnaskilnaður er vanæra fyri familjurnar, og at hjúnabandið varar til annar parturin doyr.

Deyði og jarðarferð

Hinduar trúgva á eina samsara, endurføðingarringrás ella reinkarnatión. Tá ein hindu doyr, fer sálin, atman, í eina aðra livandi veru, oftast eitt menniskja. Endurføðingarringrásin fylgir lógini um karma. Ein góð karma í hesum lívi ger, at tú fært eitt gott lív næstu ferð, men ein vánalig karma ger, at tú fært eitt verri og strævnari lív næstu ferð. Tú verður ikki dømd ella dømdur av brahman, men dømir teg sjálva ella sjálvan eitt stig upp ella niður. Eitt ella fleiri stig niður merkir, at tú mást betra lívið næstu ferð fyri at flyta uppeftir.

? sari · vígt · fet

Hinduar gera klárt at brenna lík.

Líkbrenning.

Endin á samsara er moksha. Allir hinduar vóna at náa hagar og ongantíð at føðast aftur, men verða sameindir við brahman, sálina í øllum livandi, har alt byrjaði.

Hinduar brenna síni deyðu á báli, tí so ber til at loysa sálina úr likaminum. Ofta verður bálið laðað uppeftir sum ein pallur, og meðan likamið brennur, syngja tey avvarðandi heilagar tekstir. Næsti mannligi avvarðandi gongur rundan um bálið til tess at fáa sálina úr likaminum og hevja seg móti himmalrúminum, og hann verður verandi á staðnum, til bálið slóknar. Er ein á í nánd, verður bálið kynt nær ánni, annars uttan fyri býin. Tann mannligi avvarðandi verður hjá bálinum til tað slóknar, so hann kann stroya øskuna í ánna triðja dagin eftir. Best umtókt er áin Ganges, og ofta flytur familjan eitt sindur av øsku hagar, at stroya í ánna. Hinduar í øðrum londum brúka eisini hesa loysnina.

Útbreiðsla

Nógvir indarar eru farnir úr India seinastu hundrað árini, og tí eru hinduar í mongum londum. Teir eru ofta væl útbúnir og frammarlaga á mongum vitanarøkjum, eitt nú tøkniliga.

Av og á stinga nýggjar rørslur seg upp í hinduismuni. Tær leggja ofta dent á ein heilagan mann, guru ella swami, sum hann verður nevndur, og hansara læru. Miðskeiðis í 1960-árunum lærdi ein swami, at Krishna er hægsti gudur. Við at trúgva á Krishna, kemur tú nærri tí heilaga og sleppur úr endurføðingarringrásini.

Tað, vit í vesturheiminum síggja til hinduismuna, hevur serliga við Hare Krishna at gera. Tað eru eisini teir vesturlendingar, sum hava ein guru í India, ið teir vitja. Um aldarskifti vóru umleið 13% av fólkinum í heiminum hinduar. Tey flestu í Suðurásia, tó mest í India.

FAKTA

Hare Krishna-fólkini eru kend fyri ofta at ganga í gøtunum í litríkum klæðum og siga eina bøn, eitt mantra: *Hare Krishna Hare Krishna, Hare Krishna, Krishna Krishna, Hare Hare. Hare Rama, Hare Rama, Rama Rama, Hare Hare.*

Samandrátur

- Hinduisma er ein heimsátrúnaður
- Hinduisman er tengd at søgu India
- Høvuðsgudar eru Brahma, Vishnu og Shiva
- Høvuðsskriftirnar eru vedasangirnir
- Hinduar trúgva upp á endurføðingarringrásina
- Hinduar stríðast av øllum alvi at koma úr endurføðingarringrásini
- Kastuskipanin livir enn, hóast hon varð alment tikin av í 1947
- Mannalívið hevur 16 samskararitual
- Kýr eru heilagar í India
- Yoga er ein vegur at fría seg úr endurføðingarringrásini
- Mahatma Gandhi virkaði fyri fríum India

Spurningar

1. Hvussu kann ein hindu verða fríaður úr endurføðingarringrásini?
2. Nær steðgar endurføðingarringrásin?
3. Hvør er munurin á frelsu í kristindóminum og frían í hinduismuni?
4. Hví trúgva hinduar á heilagar kýr?
5. Eru fyrimunir og vansar við at hava heilagar kýr?

Kapittul 14

Mannarøttindi

Føroyar
470

Føroyar
550

300
Føroyar

750
Mannarættindi · Human Rights
FØROYAR

Mannarættindi

Alt tað, sum tit tí vilja, at menn skulu gera móti tykkum, tað skulu tit eisini gera móti teimum; tí at hetta er lógin og profetarnir. Matt 7,12

Í Bíbliuni lesa vit, at menniskjað er skapt í Guds mynd, og fyri honum eru øll eins góð, hóast vit kunnu vera ógvuliga ymisk av lyndi, hava ymiskan húðarlit o.s.fr.

Men vit skulu ikki blaða nógvar síður í Gamla Testamenti, fyrr enn vit síggja, at ikki gongur long tíð, fyrr enn øvundsjúka og stríð tekur seg upp. Tað ónda hevur lyndi at troka seg inn ímillum allastaðni, taka valdið og seta split ímillum manna.

Gjøgnum heimssøguna eru mong dømi um, hvussu ymsar tjóðir og ymiskir ættarbólkar hava verið viðfarin av hervaldum og øðrum, sum hava hildið seg havt betri rætt til teirra ognir, ella hava hildið seg hava myndugleika at avgera teirra rætt og lagnu.

Vit kunnu ikki siga, at støðan á hesum øki er stórt frægari í dag, hóast sagt verður, at vit eru upplýst menniskju, ið skuldu vitað, at vit eiga at virða hvønn annan og tann rætt, vit øll eiga til jørðina og tað tilfeingið, vit hava fingið tillutað.

Tað grundleggjandi í orðinum mannarættindi er, at øll kunna liva í frælsi og á jøvnum føti við onnur í samfelagnum. Men vit mugu sanna, at hetta als ikki er galdandi fyri øll menniskju.

Hugtakið mannarættindi er einki nýtt fyribrigdi. Í 1776 sæst at lesa í amerikanska Frælsisbrævinum, *at øll fólk eru skapað líka.* Í 1789 vóru herrópini í fronsku kollveltingini: *frælsi, javnaður og brøðralag.* Men tó var veruleikin ein annar, tí øll høvdu ikki javnrættindi. Enn var trælahald, og enn var munur gjørdur á frælsum og ófrælsum, monnum og kvinnum, ríkum og fátøkum. Og ofta vórðu órættvísir dómar feldir.

Í Føroyum eru vit undir donsku grundlógini, sum í 1849 setti í gildi viðtøkur, sum verja rættindini hjá borgarum landsins.



FAKTA

Í 1945, tá ið seinni heimsbardagi var av, avgjørdu tey londini, ið høvdu barst ímóti Týsklandi, Italia og Japan, at alt mátti gerast, fyri at tílík kríggj ikki skuldi verða aftur. Tey settu á stovn ST og skrivaðu sáttmála, sum skuldi tryggja frið og semju millum øll heimsins lond. Nú eru fleiri enn 165 lond limir í ST-felagsskapinum. Millum mongu ráðini, ið ST hevur, er eitt trygdarráð, sum við tað sama kallar inn til fundar, um heimsfriðurin verður hóttur.

Landslag við flaggstong, 1993-94, eftir Marius Olsen, f. 1963

Sameindu Tjóðir

Vit kunnu tó ikki siga, at enn er friður í øllum heimsins londum, og av og á hoyra vit í fjølmiðlunum, at heitt verður á ST um at senda friðarvarðveitandi herlið til lond, har ófriður er.

Eftir teir báðar heimsbardagarnar samtykti ST eina heimsyvirlýsing um mannarættindi. Henda yvirlýsing kom í gildi 10. desember í 1948. Í henni eru 30 greinir um grundleggjandi rættindi og frælsi manna.

Seinni hava londini í ST eisini undirskrivað aðrar sáttmálar um fíggjarlig, almenn, mentanarlig og politisk rættindi, umframt ein sáttmála móti fólkakúgan.

Tey lond, ið eru limir í ST, hava bundið seg at hjálpa til og virka fyri, at mannarættindini og grundleggjandi frælsisrættindi verða alment kend og vird.

FAKTA

ST-teknið er eitt veraldarkort, umgirt av oljubløðum. Hetta er gamalt friðartekin.

Í høvuðsheitum kunnu mannarættindini verða sett upp í trimum

1 Frælsisrættindi

Frælsisrættindi siga okkum, at øll eru fødd sum fræls menniskju og eiga at verða viðfarin eins og kunna liva fræls og trygg.

2 Borgarlig og politisk rættindi

Borgarlig og politisk rættindi siga, at øll, ið eru myndug, hava rætt at vera við í samfelagslívinum, í fakfeløgum og politiskum feløgum. Tey hava rætt til at hugsa, trúgva og siga tað, tey vilja, og at velja, tá ið val er.

3 Búskaparlig og mentanarlig rættindi

Búskaparlig og mentanarlig rættindi siga, hvørjar skyldur samfelagið ella yvirvaldið hevur mótvegis borgarunum. Øll hava rætt til mat, klæði, bústað, heilsurøkt, undirvísing, arbeiði og frítíð. Eisini hava øll rætt til at luttaka í mentanartiltøkum.

Barnarættindi

Í 1959 samtykti ST eina yvirlýsing um barnarættindi. Í hesi yvirlýsing vóru 10 greinir, ið skuldu verja børnini. Men av tí, at henda yvirlýsing ikki var bindandi fyri londini, varð avgjørt at gera ein altjóða sáttmála um barnarættindi. Hesin sáttmáli kom í gildi 20. november í 1979, og eru nú 54 greinir í honum, og hann er galdandi fyri øll børn í heiminum. Tað grundleggjandi í hesum sáttmála er, at miðast skal eftir at gera tað, ið gagnar barninum best. Hildið verður, at best hevur barnið tað í familjuni. Um hetta ikki er so, má samfelagið tryggja barninum bestu umstøður.

Í stuttum sigur altjóða sáttmálin um barnarættindi, at børn hava rætt til

- Navn og ríkisborgararætt
- Mat, reint drekkivatn, klæði, bústað og nøktandi heilsuviðurskifti
- Frálæru, útbúgving, spæl, frítíð og at brúka síni listarligu evni
- Familjulív. Børnum, ið ongan góðan eiga, skal samfelagið taka sær av
- Samveru við onnur og loyvi at siga sína hugsan
- Frælsi og ikki at vera fyri mannamuni á nakran hátt
- Verju fyri harðskapi, misbrúki og kúgan
- Verju fyri kríggi og pínslu
- Verju av landsins og altjóða lógum

? myndug · yvirvaldið · yvirlýsing

FAKTA

Búmerki hjá Reyða Krossi og Reyða Hálvmána

Hjálparfelagsskapir

Umleið tríggir fjórðingar av heimsins borgarum búgva í menningarlondum, har búskaparliga menningin ikki er komin so langt sum t.d. í Evropa. Teimum manglar pening til vatnveiting, ídnaðarmenning, heilsuverk, skúlar v.m. Flestu av hesum londum eru í Suðuramerika, Afrika og í Ásia.

Mong menningarlond hava eisini náttúrutrupulleikar at stríðast við. Tað kann vera turkur, vatnflóð ella jarðskjálvti. Í summum londum er kríggj. Alt vanlukkur, ið krevja mong mannalív og hava neyð og flóttafólkatrupulleikar við sær.

Eftir 2. heimsbardaga fóru lond í samstarv um at royna at loysa nakrar av trupulleikunum í menningarlondunum, og fleiri hjálparfelagsskapir hava gjørt eitt megnar arbeiði á hesum øki. Tó eru eisini felagsskapir, ið eru væl eldri, og sum hava verið ógvuliga virknir at hjálpa, tá á hevur staðið.

Innsavning fyri Reyða Kross.

Hvat fæst fyri peningin í menningarlondum?
Um tú hvønn mánað í eitt ár letur

50 kr.	mýggjabitanet til 30 fólk at verja móti malaria
85 kr.	pakkar við mati til 20 vanlukkurakt
100 kr.	útbúgving til 4 heimarøktarar til aidssjúklingar
150 kr.	reint vatn til 90 børn í eitt ár

Altjóða Reyði Krossur

Henry Dunant (1828-1910) stovnaði Reyða Kross felagsskapin í 1863. Hetta hendi eftir at hann, við italska býin Solferino í 1859, sá teir mongu sorgarleikir, ið kríggið har hevði við sær. Hann royndi, saman við nøkrum kvinnum á staðnum at hjálpa særdum hermonnum úr báðum pørtum. Hann sá, at tað veruliga læt seg gera at hjálpa í kríggi og vanlukkum, um bara fyriskipanin var í lagi.

Saman við øðrum stovnaði Henry Dunant 17. februar í 1863 Reyða Kross í Genève, og longu í oktober sama ár skipaðu teir fyri teirra fyrstu ráðstevnuni, har 16 lond vóru umboðað. Eftir ráðstevnuna skrivaðu 12 lond undir tann fyrsta Genèvesáttmálan.

Reyða Kross flaggið kom eisini um hesa tíðina. Tað kom úr Sveis, og eru litirnir eins og í sveisiska flagginum, tó er reyði dúkurin vorðin hvítur, og hvíti krossurin er vorðin reyður. Reyði Krossur fekk navnið eftir tí reyða krossinum í búmerkinum.

Tey fyrstu londini í felagsskapinum vóru øll kristin lond. Tá muslimsk lond byrjaðu at koma uppí, vildu tey ikki hava tann reyða krossin sum búmerki, tí tey settu hann í samband við krossferðirnar. Tey gjørdu tí sítt egna búmerki, tann Reyða Hálvmánan. Í 1929 vóru bæði merkini

yði Krossur gevur fólki mat í eini flóttafólkalegu í Georgia.

nent viðurkend, og bæði eru nú vard undir Genèvesáttmálanum. Í 86 var almenna navnið á alheimsfelagsskapinum broytt: Altjóða yði Krossur og altjóða Reyði Hálvmáni.

yði Krossur hevur fingið Nobel friðarheiðursløna fýra ferðir. Fyrstu ð var í 1901, tá ið Henry Dunant, sum tann fyrsti nakrantíð, sjálvur k hana. Síðan er hon latin felagsskapinum í 1917 og í 1944 fyri lparareiði, gjørt varð undir heimsbardøgunum. Og seinast í 1963 fyri eiði í eina heila øld.

926 varð Reyði Krossur í Føroyum settur á stovn sum ein deild ir danska felagsskapinum. Í 1992 varð navnið broytt til Føroya Reyði ssur og er nú ein sjálvstøðug deild undir danska felagsskapinum.

Krossur veitir í dag menningar- og vanlukkuhjálp um allan heim beiðir fyri mannarættindum.

Tá Reyði Krossur Føroya varð 75 ár, vórðu hesi frímerki givin út.

FAKTA

Búmerkið hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar er fiskurin settur mitt á ein jarðarknøtt ella á ein borðisk og skal ímynda lív til heimin.



Neyðhjálp Fólkakirkjunnar

Neyðhjálp Fólkakirkjunnar varð sett á stovn í 1922. Høvuðsendamál felagsins er at berjast móti hungursneyð. Annars at hjálpa teimum fátæku til eitt virðiligt lív uttan mun til átrúnað, rasu ella politiska áskoðan.

Arbeitt verður út frá einum kristnum sjónarhorni við virðing fyri øllum mannarættindum og fyri, at øll menniskju er eins verd.

Neyðhjálp Fólkakirkjunnar hevur sínar røtur í donsku fólkakirkjuni. Felagsskapurin hjálpir neyðstøddum um allan heim.

Samstarvað verður eisini við aðrar hjálparfelagsskapir, m.a. ACT Alliance (Action by Churches Together), ið er ein heimsumfatandi felagsskapur, har fleiri enn 100 kirkjur og aðrir hjálparfelagsskapir eru við.

Slagorðini hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar eru: *Vit trúgva á eitt lív áðrenn deyðan.* Í hesum liggur teirra grundleggjandi áskoðan um arbeiðið við neyðhjálp.

Fiskurin, sum er í búmerkinum hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, er eitt kristið eyðkenni, ið gongur aftur til fyrstu tíð teirra kristnu. Fiskurin kemur frá frásøgnini í evangeliunum, tá ið Jesus gav teimum svongu at eta, fimm breyð og tveir fiskar. Eisini hava bókstavirnir í grikska orðinum fiskur, IKTYS, samheiti við orðini: Jesus Kristus Guds Sonur Frelsari.

Á grikskum merkir IKTYS

Ι	Iesous	Jesus
Κ	Kristos	Kristus
Θ	Theos	Guds
Υ	Yios	Sonur
Σ	Soter	Frelsari

Tað eru annars nógvir aðrir felagsskapir, umframt einstaklingar, ið gera eitt megnar arbeiði at bøta um hjá teimum, ið hava hjálp fyri neyðini. Her á landi hava vit fleiri, ið eru farin út í onnur lond at rætta eina hjálpandi hond. Onnur savna støðugt inn pening, klæði, og brúkslutir, ið tey føra til stød, har alt verður móttikið við takksemi og gevur teimum, ið har búgva, eina betri framtíð.

Afrikanskt barn leitar eftir mati í ruskdunganum.

...gar á Tekniska skúla í Havn í Rumenia at rætta eina hjálpandi hond.

Til eru ferðamannaskip, sum eru umbygd til flótandi sjúkrahús.

Tey eru ofta mannað við fólki, sum ólønt sigla við skipunum eina tíð og hjálpa neyðstøddum, sum tørva læknahjálp.

Tey hava umframt læknar og serlæknar alla vanliga sjúkrahúsútgerð, eisini skurðstovur.

Amnesty International

Amnesty International varð stovnað í 1961 og hevur ment seg til heimsins fremsta felagsskap í stríðnum fyri mannarættindum. Amnesty hevur deildir í einum 50 londum. Í 1965 varð ein deild sett á stovn her í Føroyum.

Amnesty International stríðist fyri at veita politiskum fangum frælsi. Hesir samvitskufangar sita fastir, tí at myndugleikarnir í landinum ikki vilja viðurkenna átrúnað teirra, politisku áskoðan, húðarlit ella rasu. Nógvir av hesum fangum eru órættvíst dømdir ella hava als ikki verið fyri nøkrum dómstóli. Eisini verða nógvir fangar píndir í fongslunum.

Enn eru lond, ið hava deyðarevsing. Eisini tey roynir Amnesty at ávirka.

FAKTA

Tendraða ljósið umgirt av píkatráði er búmerki hjá Amnesty International. Ljósið er ímyndin av mannarættindunum, ið kunnu skína sum eitt ljós, sjálvt tá myrkast sær út.

AMNESTY INTERNATIONAL

Ein, sum yvirlivdi týningarleguna, 1994, eftir Øssur Johannesen, f. 1970

Verð fyri øll

Verð
ver við okkum
kenn
okkum øll

Verð
varpa ljós á
tøgn
sum drepur lív

Verð
sig hvat bagir
tá týning pínir teg
skríggja um grið

Verð
slóða vegin
til frælsi
og frið

Verð
ver varði
fyri rættvísi
og amnesti

Ver ein verð fyri øll
ver ein verð fyri øll

Ríki
sjóðið saman
byggið
brendar brýr

Kaos
kall á Kosmos
søk
sama stev

Tí handan mánahav
handan stjørnuhválv
hómast skuggar
ið fella tár

Bárður Johannesen

Samandrátur

- Menniskjað er skapað í Guds mynd, og øll eiga at hava somu rættindi
- Hugtakið mannarættindi hevur verið at hoyrt í fleiri hundrað ár
- Danska grundlógin frá 1849 verjir rættindini hjá føroyingum
- Í 1945 varð ST, Sameindu Tjóðir, sett á stovn
- Heimsyvirlýsingin um mannarættindi kom í gildi í 1948
- Sáttmálin um barnarættindini kom í gildi í 1979
- Flestu menningarlond eru í Suðuramerika, Afrika og Ásia
- Reyði Krossur varð settur á stovn í 1863
- Neyðhjálp Fólkakirkjunnar byrjaði arbeiði sítt í 1922
- Amnesty International varð stovnað í 1961

Uppgávur

- Viðgerið greinirnar í mannarættindayvirlýsingini.
- Viðgerið greinirnar í sáttmálanum um barnarættindini.
- Er nakað í hesum báðum rættindasáttmálum, ið ikki er komið upp á pláss her hjá okkum?
- Leitið fram blaðgreinir um mannarættindi og viðgerið tær.
- Greiðið frá øðrum hjálparfelagsskapum, ið tit kenna.
- Kannið á heimasíðuni hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, ella hjá øðrum hjálparfelagsskapum, hvat fæst fyri innsavnaða peningin.
- Hvat er tað, sum fær fólk at fara undir hjálpararbeiði?